# Nýggjur sýslumaður í Eysturoynni

Síða 7

tíðindablaðið sosialurin

7,-

Nr. 128 ★ fríggjadagur 9. juli 1993

## Landsbankastjórin:

# Búskapurin kunstiga hildin niðri

Síða 5

*– Búskapurin verður kunstiga hildin niðri, tí pengarnir sum vórðu fluttir av landinum í ótryggu tíðini, ikki koma heim aftur, sigur Sigurd Poulsen, landsbankastjóri*

# Høgni hetja



# Etur gull á Isle of Wight

Síða 20

*Høgni T. Hansen, svimjari, ger ikki føroyingum fyri skommum á Oyggjaleikunum. Her fær hann handað gull fyri 4x50 blandað. Aðrar myndir eru í blaðnum og leygardagin hava vit stóra frásøgn frá Oyggjaleikunum við spillfeskum myndum og teksti*

## J. Isaksen aftur av Álandsferð:

# Okkara styrki er málið



Baksíðan

## Martin Heinesen, landsjarðfrøðingur:

# Ongin trygd fyri at olja finst í undirgrundini

Síða 9

*Martin Heinesen, landsjarðfrøðingur:*

# Ongin trygd fyri at olja finnst í Føroyum



*–Vit vita næstan einki um hvat finnst undir basaltinum í føroysku undirgrundini. Tað at bretar hava funnið olju tætt við føroyska markið og at jarðfrøðisligu viðurskiftini helst eru tey somu føroysku megin Hetlandsrennuna er ikki nakað prógv um, at olja í stórum mongdum er í føroysku undirgrundini*

Fyri 12 árum síðan bíðaðu føroyingar spentir. Í Lopra stóð eitt boritorn og ein borur gnagaði seg spakuliga niður í undirgrundina heilt niður í hitan. Borurin kom næstan 2,2 kilometur niður í undirgrundina, áðrenn útiakið varð steðgað

"Tað eydnaðist ikki at koma niður gjøgnum samlaðu basaltfláirnar, so har fingust ongar beinleiðis upplýsingar um jarðarlindir undir basaltinum." skrivar Martin Heinesen, landsjarðfrøðingur í nýggja og áhugaverda vísunda tíðarritinum Frøði, sum júst er útkomið.

"Seinni eru seismiskar kanningar gjørdar. Ljóðbylgjur eru sendar niður í jørðina, uppi á landi og úti í sjónum nærhendis boriholinum í Lopra. Seismisk upptøkutól vórðu søkt niður í boriholið, til tess at betra um møguleikarnar, at fáa upplýsingar um jarðarlindir í dýpinum

"Seismisku kanningarnar benda á, at ikki so langt undir basaltinum eru jarðlindir, sum eru ørvísi enn tær kendu basaltfláirnar, men ikki fekst at vita hvørji grótsløg eru."

"Vatn seyrar alla tíðina upp í gjøgnum boriholið í Lopra. Í hesum vatni eru heilt smáar nøgdir av olju og eitt vet av gassi setir eisini upp úr holinum. Evnisligar kanningar hava víst, at móðurgrýtið at oljuni helst er væl búnað. Men kanningar vísa einki um, hvussu nógv móðurgrýtið er, ella um tað við vissu upprunaliga er vorðið til í sjónum ella í feskum vatni "(er upprunin úr feskum vatni, so er sjáldan talan um stórar nøgdir, blðm.) skrivar Martin Heinesen í Frøði

## BP fann olju

Á heysti 1992 fann bretska oljufelagið BP stórar oljunøgdir á eini leið bert 13 fjórðingar frá føroyska sjómarkinum.

"Enn vita vit lítið um hesa oljuleið, men nógv bendir á, at jarðarlindirnar, sum oljan liggur í, og jarðfrøðisligu umstøðurnar annars, ikki eru nógv ørvísi enn nógva aðrastaðnir nærhendis Hetlandsrennuni. Tí kann tað kanska hugsast, at nøkulunda samsvarandi viðurskifti eisini kunnu vera aðrastaðni" skrivar Martin Heinesen

"Hetta er kortini einki prógv um, at olja er at finna í stórum mongdum inni á føroyskum øki, minni enn so." skrivar hann

## Mong ivamál

"Samanumtikið kunnu vit siga, at ábendingar eru um, at eldri legugrýtisfláir kunnu finnast undir basaltinum, og at onkrar av hesum fláunum kunnu verða móðurgrýti (tað eru fláir, har olja finst í, blðm.) at búnaðum lívrunnum evnum(kolvetni) Men um aðrar neyðugar fortreytir eru, vita vit lítið og einki um" skrivar Martin Heinesen

"Er goymslugrýti, takgrýti, (so oljan ikki renur burtur, blðm.) og oljufellur, (so oljan savnar seg, blðm.) til steðar? Samvirka tey á rættan hátt, og eru tey vorðin til í rættari løtu í jarðarsøguni, so olja og gass í stórum mongdum eru samlað í føroysku undirgrundini?

"Hetta eru spurningar, sum bert kunnu svarast, um umfatandi og kostnaðarmiklar kanningar verða gjørdar á føroyska økinum. Um, nær og hvussu tílíkar kanningar verða gjørdar, er eisini ein stórur og floktur spurningur, sum enn er ósvaraður." skrivar Martin Heinesen, landsjarðfrøðingur

Frammanfyri nevnda eru brot úr drúgvari grein, sum Martin Heinesen, landsjarðfrøðingur hevur skrivað í vísundablaðnum "Frøði". Greinin vísir á, at onki prógv er fyri at olja í stórum nøgdum finnst í føroysku undirgrundini men hinvegin er heldur onki prógv fyri at olja ikki finst. Fyri framman liggja drúgvar og kostnaðarmiklar kanningar.

**justinus**




*Jarðfrøðiligur skurður av Føroyum og Hetlandi. Sum sæst, so er rættuliga fitt av vitan um økið hetlandsmegin rennuna, men ongin vitan um, hvat finst undir føroysku basaltfláunum. Mynd: Frøði*

Teir 16 trolbátarnir:

# Sama fiskiskap sum í fjør

*Men ongin bátur hevur skarað framúr í summar*

Tað hevur ikki verið tann stóri fiskiskapurin, teir 16 trolbátarnir á landleiðini hava fingið í summar. Men fiskiskapurin hevur heldur ikki verið út av lagi vánaligur. Trolbátarnir hava sama trupulleika sum restin av flotanum, prísurin er alt ov vánaligur í løtuni.

Mikudagin lá trolbáturin Randi av Toftum á Havnini og tók ís. Teir høvdu landað 24.000 pund í Klaksvík og vóru nú á veg aftur á fiskileið. Trolbátarnir royna í løtuni eystanfyri innanfyri 12 fjórðinga markið.

Ein av manningini vit tosaðu við segði, at fiskiskapurin var nøkulunda tann sami sum í fjør og í ár var ongin bátur, su skaraði framúr.

Trolbátarnir sleppa at royna til einaferð úti august og tað er serliga flatfiskur teir skulu fáa

**justinus**



*Randi tók í Havn mikludagin. Mynd: Jens Chr. Vang*